# Flettu á húsarhaldsbreyt á Argjum

SKÚLI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun Abrahamsen*

Mánadagin høvdu tey av sonnum øðrvísi undirvísing á Argja skúla. Hetta er tíðin, tá fjøllini verða gingin, og tað sluppu næmingarnir á húsarhaldsbreytini eisini at kenna, tá tey flettu eitt lamb í skúlakøkinum.

Tað eru næmingar í tíggjunduflokkum á Venjingarskúlanum og Argja skúla, sum ganga á húsarhaldsbreytini á Argja skúla. Lærarin, Sára Dam, hevði fingið starvsfelaga sín, Búa Brattaberg, at hjálpa sær. Búi er tikin úr leikum at fletta, tí hann hevur eina fortíð sum bóndi í Mykinesi.

Búi greiddi næmingunum væl frá tí, hann gjørdi og hevði umframt søgur um bæði træala- og konubitan. Sperðilin er ein ektaður suðuroyarsperðil – fyltur við góðum kjøti og ikki sum tann, vit kenna norðranfyri - fyltur við fiti.

Dagurin gekk væl. Flettingin – og frágreiðingarnar hjá Búa – tók einar tveir tímar, og næmingarnir lótu væl at, hóast onkur gramdi seg um lukt.



*Búi Brattaberg, lærari og fyrrverandi bóndi, og Durita koma við lambinum, ið flettast skal*



*Suðuroyarsperðilin – fyltur við kjøti*



*Búi Brattaberg við krovinum. Næmingarnir eru frá vinstru: Lív, Anja, Heidi, Barbara, Barbara og Durita*








www.sosialurin.fo

Fyrilestur í miðlahúsinum

Fyrilestur við **Ole Spiermann,** professara í altjóðarætti, um evnið ríkisfelagsskapurin og ríkisrættarstøða Føroya, verður í miðlahúsinum

**hóskvøldið 25. oktober. kl. 19:30**



**Ole Spiermann**

Ole Spiermann hevur skrivað fleiri greinar og bøkur um altjóðarætt og fekk longu í 1994 gullheiðursløn fyri slóðbrótandi verkið um fullveldishugtakið, »Enten & Eller«.

***Øll eru vælkomin***




Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni